## Kunnu fáa deyðarevsing

Teir seinastu mánaðarnar hava norðmenninir Joshua French og Tjostolv Moland sitið í fongsli í Demokratiska Lýðveldinum Kongo, har teir eru ákærdir fyri dráp, drápsroynd, njósning og stuldur. Teir báðir menninir, sum eru 27 og 28 ára gamlir, nokta seg sekar. Men ákærin ivast ikki í, at teir eru sekir í øllum ákærunum, og at teir harumframt høvdu ætlanir um at skipa eitt brotsmannakervi, sum skuldi leypa á fólk og taka teirra ognir. Norskir fjølmiðlar skriva, at verða teir báðir menninir dømdir sambært ákæruritinum, kunnu teir fáa deyðarevsing.



## Norðmenn vóru krígsbrotsmenn

Ein nýggj bók hjá norska tíðindamanninum Eirik Veum avdúkar, at nakrir norðmenn gjørdu seg sekar í krígsbrotsverki, tá teir gjørdu tænastu í týska herinum undir seinna heimsbardaga. Høvundurin skrivar, at teir flestu norðmenninir, sum fullu í týskari hertænastu, gjørdu tænastu sum vanligir hermenn. Men nakrir norskir hermenn vóru í týskum deildum, sum útruddaðu jødarnar í polska høvuðsstaðnum Watszawa um heystið í 1944, og minst tríggir teirra fullu har. Tilsamans doyðu 836 norðmenn í týskari hertænastu undir seinna heimsbardaga.

# Vitjaði ommu Barak

**Oluf Mortensen, sum er við í eini serligari menningarætlan fyri børn í Kenya, fekk fyrr í ár høvi at heilsa upp á ommu amerikanska forsetan Barak Obama. Omman, Sarah Obama tosar javnan við ommusonin**



*Tey nógvu børnini í bygdini fjeppaðust uppi í gestunum. Hesi vóru tó í so ung at koma á fótbóltsskúla*

MENNINGARHJÁLP
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*
*Myndir: Oluf Mortensen*

Uttanríkisráðið stuðlaði fyrr í ár felgsskapinum Vest-Kenyas Venner við góðum 30.000 krónum, og tað er ein heilt serlig menningarætlan við endamálinum at basa útbreiðsluni av HIV og AIDS.

Amboðini eru ein fótbóltsskúli, sjónleikur, drama og gykl.

Í 2007 stuðlaðu Føroyar eisini hesi ætlan, men tá við eini minni upphædd.

At Føroyar stuðla hesi verkætlan er Olufi Mortensen í Havn fyri at takka.

### Venjarin ringdi

Oluf Mortensen var í sínari tíð á fótbóltslandsliðnum, og líka síðan 1988 hevur hann havt samband við danska venjaran, sum hann hevði tá.

- Ein dag ringdi hesin venjarin og segði, at hann hevði brúk fyri mær. Hann vildi hava meg við sum fótbóltsvenjara til Kenya, sigur Oluf Mortensen. Hann fekk bara eina løtu at hugsa seg um og tók av.

Maðurin arbeiðir fyri DBU og hevur eisini havt fótbóltsskúlar aðrastaðni, í Norðurlondum og í Gana. Hansara royndir vóru, at gjøgnum spæl ber væl til at fáa børn og ung í talu.

OlufMortesen fekk Uttanríkisráðið at stuðla, og hann fór so saman við nøkrum dønum niður til fátækrabygdina Asembo, har fyrsti fótbóltsskúlin var í økinum Kisumu í Vesturkenya, beint við Viktoriasjógvin. Skúlin var fyri átta bygdir.

### Neyð og vesaldómur

Ongastaðni í heiminum er so nógv slumm sum í Nairobi í Kenya. Umleið 900.000 fólk búgva í slumminum har.

Í Kenya eru nógv foreldraleys børn, sum ganga fyri vág og vind, tí foreldrini eru deyð av AIDS. Útbreiðslan av HIV/AIDS og av malaria er stór.

- Eins og í øllum øðrum londum eru nógv børn upptikin av fótbólti, og málið við fótbóltsskúlanum er at læra tey skipað fótbóltsspæl og harvið eitt skipað lív, sigur Oluf Mortensen, sum gongur við lív og sál upp í hesa menningarætlan.

Øll tíma tó ikki fótbólt og fyri at náa tey børnini vóru onnur fólk við og undirvístu í drama, sjónleiki, rørslu og akrobatikki.

### Skipaðir dagar

- Tað ræður um at fáa tey at hugsa meira klárt og soleiðis at kunna taka ímóti upplýsing um AIDS, og hvussu sjúkan kann fyribyrgjast.

Oluf Mortensen var sjálvur triði við sum fótbóltsvenjari í 2007, í ár vóru teir fýra, og teir fingu so tveir ungar lærarar úr hvørji bygd aftrat sær sum hjálparvenjarar, og teir skulu so vera venjarar, tá ið skúlin er av. Gularótin hjá teimum er, at tveir teir bestu næsta ár sleppa til Danmarkar á venjingarskeið í ein mánað. Hetta verður gjørt fyri at eggja teimum til at leggja nógva orku í arbeiðið.



*Tað var ein stór løta fyri Oluf Mortensen at sleppa at sita undir liðini á ommu amerikanska forsetan og hoyra hana greiða frá um ommusonin*

Onnur fólk tóku sær av sjónleikinum, gyklinum og øllum tí.

Tað er ógvuliga fátækslig har á leiðini. Eingin streymveiting, og einki vatn heldur.

Oluf Mortensen og hinir fótbóltsvenjararnir komu við brúktum búnum, fótbóltsskóm og bóltum til børnini. Frammanundan kendu kenyansku børnini bara til at sparka skóleys við bóltum, sum tey sjálv høvdu gjørt.

Skúlin var strangur, og venjararnir góðtóku ikki, at summi komu dreivandi langt eftir ásetta tíð um morgunin. Hetta var fyri at læra tey at hava skipaðar dagar. Sama var galdandi fyri hjálparvenjararnar, sum skulu vera fyrimyndir hjá børnunum.

### Tá kvøldið kemur

Skúlin vardi í seks dagar og øll tiltøkini endaði við Kenya-Open. Tá vórðu foreldur og onnur boðin við at síggja børnini spæla fótbólt og framføra.

- Tað eydnaðist ótrúliga væl, og tí var einki at ivast í, at tiltakið skuldi endurtakast, sigur Oluf Mortensen.

Tey spældu á ymisk ljóðføri, og Oluf Mortensen tók gittaran og sang "Tá kvøldið kemur" fyri stóru fjøldini, ið komin var til tiltakið.

Ein útlendskur hjálparfelagsskapur kann ikki bara fara til Kenya við eini slíkari verkætlan. Ætlanin mátti fyrst góðkennast av einum ráði í bygdini, og fundur var tí fyrst við tey. Í hesum ráð sótu bara eldri menn, og teir fingu sum ráð at velja yngri fólk í hetta ráðið fyri lættari at koma í talu við børn og ung fólk og upplýsa tey um vandan fyri smittu.

- Vit tosaðu eisini við tey